## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind. Regn av og á og hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi, seinni veksur hann vindin til storm. Regn ella vátakavi av og á og hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi, seinnapartin minni vindur av vestri. Ælingur, partvís kavi og hitin millum frostmarkið og +3 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av landnyrðingi ella av ymsum ættum. Mánadagin okkurt ælið, men týsdagin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og +3 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# »Vit liva í vónini«

**Jákup Olsen (67) er ógvuliga ítróttarhugaður. Hann vónar at VB fær eitt gott fótbóltsár í ár**

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*– Jákup Olsen í Vági fylgir væl við hondbólt og fótbólti. – Tað verður ein spennandi fótbóltskapping í summar, sigur hann*

*Mynd: Snorri Brend*

**■ Hvat fær tú dagin at ganga við?**
– Beint nú eri eg á veg til Suðuroyar við Smyrli. Her havi eg 20 áseyðir og seks veðrar. Tað bindir meg til oynna, men hinvegin so búgva øll trý børnini í Havn.

**■ Hvussu sær framtíðin út hjá Suðuroynni?**
– Vit liva í vónini, at framtíðin skal gerast betri enn støðan er í dag. Her eru góðar kreftir, sum kunnu fáa oynna upp aftur at standa til tað, sum hon einaferð var.

**■ Hvussu fer at ganga hjá VB í ár?**
– Eg plagi at hyggja nógv eftir bæði hondbólti og fótbólti, og royni soleiðis at fylgja við sum best. Hjá besta mansliðnum í fótbólti er støðan tann, at teir hava mist nógvar góðar leikarar, men nýggir spælarar eru eisini komnir. Kappingin verður spennandi í ár, eingin ivi um tað. Í hondbóltinum kundi gingið betri í ár, men hinvegin so hevur Vágs Svimjifelag altíð staðið seg væl.

**■ Hvat heldur tú um at tit mistu miðnámskúlan úr býnum?**
– Eg hevði sjálvandi ynskt, at hann varð verandi her í Vági. Tað var keðiligt at hann fór úr býnum, men ein fær ikki altíð tað besta. So má ein taka til takkar við tí næstbesta.

**■ Fer tú uttanlands í summar?**
– Vit hava ikki planlagt tað enn, men vit plaga at vera uttanlands. Vit vóru í Rom í 2004 og í Madrid í fjør, men annars hava vit fyri tað mesta verið í Danmark

**■ Hvørjum vil tú heilsa?**
– Eg vil senda eina serliga heilsan til gummu mína, Johanna Maria Olsen í Vági (vanliga nevnd Hannemia). Hon verður 100 ár 17. mars!

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -14 |
| Nuuk | -12 |
| Qaqortoq | -7 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 11 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -4 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | -12 |
| Moskva | -6 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | -2 |
| Kiev | -5 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 8 |
| Malta | 11 |
| Tunis | 9 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | -- |
| New York | 6 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | -- |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 988 hPa. eystan fyri Ísland fer norðureftir. Brúgvalagið haðani verður nær Føroyum fríggjadagin. Eitt annað lágtrýst, 979 hPa. eystan fyri Hvarvið fer spakuliga eystureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Ísland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 8/3 kl. 06⁰⁰– 9/3. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,1°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 1,2 mm – mált frá 8/3 kl. 06⁰⁰– 9/3 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 5,0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 27. februar | Mánin næstur jørðini |
| 6. mars | Fyrra kvarter |
| 13. mars | Mánin longst frá jørðini |
| 14. mars | Fullmáni |

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. Mars | 02.46 | 15.10 | 01.46 | 14.10 | 02.01 | 14.25 | 04.46 | 17.10 | 05.46 | 18.10 | 01.01 | 13.25 | 00.01 | 12.25 | 03.01 | 15.25 | 04.01 | 16.25 | 02.31 | 14.55 | 03.46 | 16.10 |
| 10. Mars | 03.35 | 15.58 | 02.35 | 14.58 | 02.50 | 15.13 | 05.35 | 17.58 | 06.35 | 18.58 | 01.50 | 14.13 | 00.50 | 13.13 | 03.50 | 16.13 | 04.50 | 17.13 | 03.20 | 15.43 | 04.35 | 16.58 |
| 11. Mars | 04.22 | 16.43 | 03.22 | 15.43 | 03.37 | 15.58 | 06.22 | 18.43 | 07.22 | 19.43 | 02.37 | 14.58 | 01.37 | 13.58 | 04.37 | 16.58 | 05.37 | 17.58 | 04.07 | 16.28 | 05.22 | 17.43 |
| 12. Mars | 05.05 | 17.25 | 04.05 | 16.25 | 04.20 | 16.40 | 07.05 | 19.25 | 08.05 | 20.25 | 03.20 | 15.40 | 02.20 | 14.40 | 05.20 | 17.40 | 06.20 | 18.40 | 04.50 | 17.10 | 06.05 | 18.25 |
| 13. Mars | 05.46 | 18.04 | 04.46 | 17.04 | 05.01 | 17.19 | 07.46 | 20.04 | 08.46 | 21.04 | 04.01 | 16.19 | 03.01 | 15.19 | 06.01 | 18.19 | 07.01 | 19.19 | 05.31 | 17.49 | 06.46 | 19.04 |

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

BOXEN

**Vika 9 – 5. mars**

1. Centrum:
**62 - 34 - 70 - 41 - 20 - 55 - 03 - 04 - 49 - 16 - 64 - 42 - 13 - 07 - 38**

1. Ramme:
**17 - 43 - 23 - 52 - 71 - 30 - 37 - 57 - 15 - 67 - 01 - 59 - 28 - 40 - 08 - 19 - 56 - 05 - 47 - 65 - 73**

Fuld plade:
**44 - 18 - 22 - 09 - 35 - 31 - 60**

Fri spil: **BO__N**

| | |
|---|---|
| Fuld plade: 1. pr. | **157.283,- kr.** |
| 1. Ramme: 2. pr. | **27.142,- kr.** |
| 1. Centrum: 3. pr. | **13.586,- kr.** |
| Ramme: 4. pr. | **2.199,- kr.** |
| Centrum: 5. pr. | **28,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

TIPS HAL

## TIPS 12 úrslit
**Vika 9– 5. mars**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | AaB - OB | x |
| 2. | B 1909 - Esbjerg | 2 |
| 3. | Brøndby - FC København | x |
| 4. | Tottenham - Blackburn | 1 |
| 5. | B.M'gladbach - Bielefeld | 1 |
| 6. | B.M'gladbach - Bielefeld | x |
| 7. | Chievo - Lazio | x |
| 8. | Fiorentina - Siena | 1 |
| 9. | Udinese - Ascoli | x |
| 10. | Celta Vigo - Osasuna | 1 |
| 11. | Getafe - Betis | 1 |
| 12. | Real Sociedad - Zaragoza | 2 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 rætt: | 20.349,- kr. |
| 11 rætt: | 405,- kr. |
| 10 rætt: | 56,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

5 707265 100050